## BRÚDLEYP

Í dag giftast í Esbjerg Rotha Højgaard Joensen og Chris Joensen.
Brúdleypsadr.: Fuglebakkevej 15, 6705 Esbjerg Ø.

Í dag, 22. november kl. 13.00 giftast í Sjóvar kirkju Anja Danielsen, Strendur og Øyvind Olsen, Rituvík. Veitsla verður fyri innbodnum í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 16.30 og kl. 21.00 verður vælkomst, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 6. desember kl. 14.00 giftast í Býráðssalinum í Klaksvík, Martha Justesen, Norðdepli og Andrias Hammer, Eiði. Veitslan verður hildin í Skúlanum á Fossánesi kl. 18.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 318709, 423081 ella 452074 áðrenn 23. nov.

Leygardagin 6. desember kl. 16.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Joan Símunardóttir Poulsen úr Oyndarfirði og Bjarni Joensen av Tvøroyri. Brúdleypið verður hildið á Hotel Øravík kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 20. desember kl. 11.30 giftast í Vesturkirkjuni Rannvá Hentze Rasmussen, Argir og Dávid Reinert Davidsen, Tórshavn. Veitsla verður í Leguhúsinum í Nesvík kl. 15.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 313303 ella 314699 áðrenn 5. des.

## 90 ÁR

26. november fyllir Mia Hansen, Tórshavn, ættað frá Gjógv, 90 ár. Føðingardagurin verður hildin leygardagin 29. november millum kl. 14 og 17 í KFUK. Tey, sum vilja heilsa upp á hana, eru vælkomin har.

## 80 ÁR

22. nov. verður Oluf Skaalum, Hvalba 80 ár. Dagurin verður hildin saman við børnunum hjá Hannu og Tóra Midjord.

## 70 ÁR

24. november fyllir Ajlif Hansen 70 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 22. november í Felagsloníni í Fuglafirði kl. 19.00.

## SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 25. november hava Bente og John Kjær, Hoyvík, verið gift í 25 ár. Tey, ið vilja heilsa uppá silvurbrúðarparið, eru henda dag vælkomin inn á gólvið í hølum Starvsmannafelagsins í J. H. Schrøtersgøtu 9, Tórshavn, har opið hús verður millum kl. 14.00 og 19.00. Øll eru vælkomin.

Mánadagin 15. desember hava Anna og Juel Høgnesen, Leirvík, verið gift í 25 ár. Dagurin verðu rhildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 20. desember kl. 19. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 270682 ella 228286 áðrenn 10. dsember.

## GULLBRÚDLEYP

Týsdagin 2. desember hava hjúnini Jenny og Venzel Olsen, Rituvík gullbrúdleyp. Tey, ið vilja heilsa uppá gullbrúðarparið eru vælkomin á Runavíkar Sjómansheim kl. 18.

## PRÓGV

10. nov. 2003 hevur Bogi Eliasen, Tórshavn, lokið prógv sum cand. scient. pol./samfelagsfrøðingur við Århus Universitet.

## TILTØK

**Gudstænastur**
**23. sunnudag e. trinitatis**
*Vesturkirkjan:* kl. 11,
*Kirkjubøur:* kl. 12.30, Bergur D. Joensen
*Havnar kirkja:* kl. 11, Bjarni Bæk
*Nólsoy:* kl. 12, Sonja Klein
*Hvítanes:* kl. 11,
*Kaldbak:* kl. 12, altarg., Sverri Steinhólm
*Kollafjørður:* kl. 12, Inga Poulsen Dam
*Gásadalur:* kl. 11, John Myllhamar
*Fuglafjørður:* kl. 12, Uni Næs
*Funningur:* kl. 12 messa, Emil Olsen
*Skála:* kl. 17 altarg., prestarnir í Eysturoynni
*Viðareiði:* altarg., Elsa Funding
*Christianskirkjan:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen
*Húsar:* kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer
*Tjørnuvík:* kl. 12, Kingogudstænasta við Kingokórinum, H. J. Joensen biskupur og Mogens T. Christensen
*Dalur:* kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen
*Fámjin:* kl. 14 familju- og barnagudstænasta. *Eisini luttekur sunnudagsskúlin í missiónshúsinum á Tvøroyri. Farið verður frá missiónshúsinum kl. 13.30.* Jónsvein Bech
*Skála:* kl. 11,
*Sjóvar kirkja:* kl. 12, Jógvan Fríðriksson
*Fríðrikskirkjan:* kl. 11, Martin Restorff Jacobsen
*Søldarfjørður:* kl. 11, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Hvalba:* kl. 12.30, Ólavur Rasmussen

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Møti v/ Elisabeth og Sámal Jákup Joensen, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti v/ Torill og Niels Edvard Olsen.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøtir.

**Katólska kirkjan**
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ Pater Torsten Jortzick í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánadagin tann 24. nov. kl. 19.30 vil systir Maria fortelja um systrarnar og ta kvinnuna, sum var stovnari teirra, og sum varð sælugjørd síðsta ár í Rom. Aftaná verður ein videofilmur. Komið og hoyrið meira um hesa kvinnu við sterkari trúgv, um systurlagið, hon setti á stovn og tær 8000 fransiskanarasystrarnar, sum eru um allan heimin í dag, eisini í Føroyum.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 verður Morgunmøti og samstundis verður barnaansing, kl. 11.30 verður samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini møti har Páll Poulsen talar um evnið: Krúna skaparverksins (1. Mósebók, kap. 2).
www.hebron.fo

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnukvøldið Møti v/ Frits Thomsen, Skála.
Sjómanskvinnuringurin kemur saman mánakvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum og møti sunnukvøldið kl. 18 v/ Jústines Poulsen.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Sam Jakobsen, kl. 16 Samkomufundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Samkoman Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Símun Absalonsen um evnið: Hvussu skal eg brúka restina av lívi mínum? og á tilbiðjunarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Z. um evnið: Tær sjey samkomurnar í Opinberingini – Pergamus. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 (í eini skúlastovu) Bíbliutími, undirvíst verður um Opinberingina. Heimasíðan. www.livdin.fo

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði.
Mikudagin kl. 17.30 AWANA, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
www.ebenezer.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagin kl. 15 í KFUK: KFUK fundur fyri limir.
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Bjarna Bæk dómprósti. Evnið: Harmljóðini.
Týsdagin kl. 17 í FKUK: Várgleði fyri børn.

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Klæmint Tausen, Manskórið syngur.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Fríggjakvøldið kl. 20 JC Teens – eitt spennandi ungdómsmøti har nógv ymiskt er á skránni.
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli. Eisini verður kaffi. Øll eru vælkomin.
www.rhema.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Fríggjakvøldið kl. 20 After Eight.
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jóhan P. Johannesen.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18 Møti við fríum vitnisburði.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
Týsdagink l. 20 Opið hús fyri ung.
Telefonandaktin 424741.

**Vestmanna**
Gospel-country verður í auluni í skúlanum leygarkvøldið kl. 20 við tónleikarum og sangfólki úr Vestmanna o.a.

**Missiónshúsið Libanon, Sørvágur**
Vikuskiftismøtir verða í missiónshúsinum í Sørvági í døgunum 21.-23. nov.
Í kvøld kl. 20 luttøka úr Klaksvík, Kristoffur, Theodor og John Kári syngja.
Sunnukvøldið kl. 18 Vitjan frá Kelduni, Manskórið og Streingjakórið syngja.

**Skúlin, Gásadalur**
Um vikuskiftið verður missiónsvika. Leygarkvøldið kl. 20 Møti.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta og kl. 17 Møti, John S. Myllhamar trúboðari talar.

**Keldan, Skálafirði**
Sunnudagin kl. 17 Møti við Egil, Heidi, Beintu o.fl.
Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Sjómanskvinnuringurin í Runavík**
kemur saman mánakvøldið kl. 19.30 til hugnaløtu. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar at vera við.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20. Øll eru vælkomin. Drekka verður aftaná møti.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*»Eg eri víntræið, tit eru greinarnar; tann, sum verður í mær og eg í honum, hann ber miklan ávøkst, tí at uttan meg kunnu tit als einki gera«*

*Jóh. 15, v. 5*

Jesus er kendur fyri alla tíðina í boðskapi sínum at tríva í myndir, líknilsir og sammetingar fyri við teimum at lata upp hjørtuni á sínum áhoyrarum, at teir betri kunnu taka til sín tey gleðiboð, sum hann hevur at geva okkum lut í.

At brúka træið sum mynd ella líknilsi man vera eins gamalt og menniskja er. Træið er ein so sjáldsamur og talandi vøkstur, at hann kann peika okkum menniskjum á tað, sum er støðugt, varandi og álítandi, tí ikki bara kunnu trø gerast elligomul – standa har í mong, mong ættarlið – men eisini kunnu trø yvirliva og standa í blóma, har so mangir aðrir vøkstur uttanum følnaðu, doyðu í raki og tosta, tí trøini kunnu við sínum sevjumiklu rótum hava samband við dýpdirnar undir jørð, ið ongantíð todna upp. Ikki so løgið, at so mangan er træið sætt sum sambindingarliðið millum tað, sum er her á jørð – tað, sum er í dýpdunum undir jørð sum tað, ið er uppi í himmalsku hæddunum, sum trøini við greinum sínum eisini kunnu peika okkum ímóti.

Nú er í Jesu orðum ikki talan um træið sum so, men um víntræið – hetta træið, ið fyrst og fremst umboðar gleðina og tað gleðiliga, eisini sambært Jesu orðum her: »Hetta havi eg talað til tykkara, til tess at gleði mín kann vera í tykkum, og gleði tykkara kann verða fullkomin«. Og tað gleðiliga Jesus vil peika á við myndini av víntrænum er, at hóast hann nú má fara frá lærusveinunum, so skulu vegir teirra kortini ikki skiljast.

Eisini framyvir fer Jesus sum hin upprisni at fylgja teimum, ja so neyvt skal sambandið verða teirra millum sum træið og tess greinar eru og verða óatskiljandi. Har skal eisini framyvir, ja alt til veraldar enda verða ein felagsskapur millum hin upprisna og fólk hansara, har vit sum greinar skulu kenna okkum lívgaðar og uppihildnar í lívssambandinum við træið – har tað altíð verður galdandi »at uttan meg kunnu tit als einki gera«.

Og fyri at kunna avmynda hesa óslítandi framtíðar eindina, hvat er tá fyri einum suðurlendingi natúrligari enn at hugsa um træið og greinarnar? At missir greinin sambandið við træið, er hon deyðadømd, tí tað er úr trænum, at hon fær tikið til sín alt tað, sum henni er tørvur á fyri at verða verandi á lívi.

Og so er spurningurin, um ikki myndin av trænum og greinunum eisini kann vendast við: at ikki bara greinin má hava lívssamband við træið, men at eisini sjálvt træið er og verður knýtt at greinunum. Hvat er eitt træ uttan greinar, og eru tað ikki vit, ið sum greinar eru settar at umboða og mynda træið úteftir? Eru tað ikki vit gróðursettu, ið skulu verða trænum greinar? Í lív iog deyða at peika á hin krossfesta og upprisna, og gera hansara gerning, inntil hann kemur?

**Martin Restorff Jacobsen, prestur**



## TILTØK

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Mánadagin kl. 17.30 Tim 5, kl. 20 Ungdómsmøti. Øll eru vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við húsbólki. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.jesus.fo

**Missiónshúsið í Gøtu**
Ungdómsmøti verður í kirkjukjallaranum í kvøld kl. 20 við Jens Súna Hansen av Argjum, øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kirkjukjallarin í Gøtu**
Sjómanskvinnuringarnir í Leirvík, Fuglafirði, Hellunum, Oyndarfirði og Gøtu møtast til hugnaløtu o.a. í kirkjukjallaranum í Gøtu týskvøldið 25. nov. kl. 19.30. Torleif Jóhannesen veðrur við. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli. Einki møti kl. 19 vegna kirkjugongd.
Missiónsvikan byrjar týskvøldið 25. nov. kl. 20. Jógvan prestur talar og Streingjakórið syngur. Missiónsvikan heldur fram vikuna út.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sangkvøld og opið hús verður í kvøld saman við ungdómsmøtinum kl. 21.
Í morgin verður sunnudagsskúli í Thabor og á Kambsdali kl. 14.30. Møti verður kl. 18.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti, Teir 4 úr Havn luttaka, kl. 21 Ungdómsmøti, ung av Skála og sangbólkur luttekur.

**Betesda, Klaksvík**
Fundarrøðin undir heitinum: »Kristus – svar okkara« við Svenning av Lofti, Hjørleif Vang, Poul J. Djurhuus og Páll á Lakjuni endar við fundum í kvøld kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. Í kvøld er heitið: »Kristus – vegleiðari okkara«. Systrarnar Anna, Sólvá og Elin úr Havn syngja. Sunnukvøldið 23. nov er heitið »Kristus – vón okkara«. Manskvartettin (nýggja) og Sangkórið syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Margar Toftegaard.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**KFUM og K í Klaksvík**
Bønarmøti er hvørt kvøld kl. 19.
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús. Øll hjartaliga vælkomin.
Leygarkvøldið kl. 19.30 verður filmur vístur um missión í Afrika, v/ Hildu Viderø. Gimmi verður eisini online yvir internetið úr Mali í Afrika. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Torleif Jóhannessen. Taborkórið av Toftum syngur. Kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.kuff.fo

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20 Hugnaløta fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti.
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti um kvøldið vegna missiónsvikuna í Dali.
Mánadagin kl. 19 Barnaarbeiði 1.-6. fl. Kl. 19 kemur ungdómurin saman frá 7. fl. og eldri. Hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygarkvøldið kl. 20 Bíbliutími við Tummas Jacobsen.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18 Evangel. møti. Vælkomin í Betania.

**Sands Missiónshús**
Evnismøtir vera vikuskiftið 28.-30. november.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnudagsskúlabørnini fara til Fámjin í sunnudagsskúla sunnudagin kl.14.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Jónsvein Bech. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Fríggjakvøldið kl. 20 Bíbliutími: Uppreisnin.
Leygarkvøldið kl. 20 Bíbliutími: Dómstólur Kristusar.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Magnus Jensen talar.
Týskvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Bygdarhúsið í Lopra**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sumba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við Hannu Thomassen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyahúsið**
Sunnudagin 30. nov. kl. 17 verður evangeliskt møti í Føroyahúsinum, Vesterbrogade 17A, Keypmannahavn. Símun Pætur á Torkilsheyggi og Gunnar Nielsen luttaka. Á skránni verður eisini felagssangur og sangframførsla. Aftaná verður ókeypis drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Føroyskt felag í Ballerup**
Sunnudagin 30. nov. kl. 15 verður bingospæl í »Loen« á Ryttergården í Pederstrup. Nógvir góðir vinningar til børn og vaksin. Byrjað verður við at tendra adventskransin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 24. november*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Vit hugsa um jólini
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl,dart og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin, tlf. 316491
kl. 14-18 Jólasøla
**Jólasøla og tombola verður alla vikuna á miðhæddini og í kjallaranum er loppumarknaður og bókasøla frá kl. 14-17. Inngongd frá miðhæddini.**
*Týsdagin 25. november*
kl. 10-12.00 Vit baka til jóla
kl. 10-11.30 Vit syngja, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14-17 Jólasøla
*Mikudagin 26. november*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Til ber at koma sum gestir
kl. 14-17 Jólasøla
*Hósdagin 27. november*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17.00 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Jólasøla
*Fríggjadagin 28. november*
kl. 10-13.00 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00 Døgurði. Til ber at koma sum gestir
kl. 14-17 Jólasøla

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 23. november verður gongutúrur um Reynsmúlalág til Kirkjubøar. Byrjað verður við Krossin (Mykinesgøta) kl. 10.30. Lættur túrur. Havið heit og góð gonguklæðir og drekkamunn við. Tilmelding.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum*
*Mánadagin 24. nov.*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest. Drekkamuður
*Týsdagin 25. nov.*
Drekkamuður. Ítrív fyri áhugað
*Mikudagin 25. nov.*
Hugnaløta v/ drekkamunni. Burturluting.
*Hósdagin 27. nov.*
Drekkamuður. Afturhvarv í práti og sangi
*Fríggjadagin 21. nov.*
Opið hús. Kaffi, te og pannukøkur

*Eins og vanligt er, verður byrjað við einum Guðs orði, og framvegis eru luttakararnir vælkomnir at taka eitt og hvørt ítriv við sær, eitt nú stokkar o.a. Bløðini eru til taks í Fløvanum. Serflutningstænastan v/ Andreas Poulsen er byrjað. Hava tygum tørv á koyring, ringið vinarligast tlf. 448051.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa.
*Mánadagin 24. nov.*
Tórálvur Mohr Olsen sigur frá upplivingum.
*Mikudagin 25. nov.*
Sólrun Christiansen lesur 15. brot úr søguni »Sin egen lykkes smed«.
Mikudagin 3. desember bjóðar missiónshúsið í Skálavík til eitt jólahugnakvøld við døgurða og undirhaldið. Kostnaður 100 kr. Farið verður úr Tilhaldinum við bussi kl. 17.30. Neyðugt er at tekna seg til tiltakið í Tilhaldinum ella á tlf. 361990 í seinasta lagi 26. november.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, miku- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.acadanmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.
Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 13.00-16.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:**
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50.

**Deyvafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10B*
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 fax 313609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
*Íslandsvegur 10c*
*FO-100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Tlf. 317373, fartlf. 264839 faks. 310813
Teldupostur: mbf@mbf.fo
Heimasíðan: www.mbf.fo

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 22.11. Runavík tlf. 44 80 16
Sunnudagin 23.11. Gøta tlf. 44 10 86

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 10-11. Tlf. 314544.